# Fólkaskúlin undir luppin eftir PISA-skelkirnar




**Føroyskir skúlanæmingar eru ringast fyri í Norðurlondum í lesing, støddfrøði og náttúruvísindum, vísti PISA-kanningin frá 2009. Skúlin má lyftast upp á hægri stig, halda tey flestu, men kjakið endar ofta við togtogan millum Lærarafelagið og Mentamálaráðið ella politikarar um stórar ella smáar skúlar. Reflektiónsseminarið á Føroya Fólkaháskúla 10. mars um fólkaskúlan fer at leggja dent á innihaldið í skúlanum. Hvussu kann hann gerast betri, hvønn skúla vilja vit hava, og hvønn skúla krevur nýggja tíðin, at vit fáa**

Uni Arge

Flestu foreldur í landinum mundu sett døgurðan í hálsin, tá fjølmiðlarnir í 2006 kunngjørdu úrslitið av eini altjóða kanning, ið nevndist PISA-kanningin. Almenningurin hevði onki hoyrt um hesa kanning fyrr, men úrslitið var nóg skelkandi fyri tað. Føroysk skúlabørn vóru sera illa fyri samanborið við skúlabørn í øðrum londum. Føroyar lógu á næstaftasta plássi í kanningini framman fyri dumpikandidatin, Meksiko, varð staðfest, og so fór ein sjálvrannsakan í gongd, sum ikki er endað enn. Lærarafelagið vardi seg sum frægast, politikarar skuldu greiða frá, hví so lítið fekst burtur úr pengunum, og foreldrini, sum mundu sett døgurðan í hálsin, hugdu at sínum kæru børnum og spurdu, um tey vóru sibbar.

PISA-kanningin í 2006 loypti veruliga hvøkk á alt samfelagið og skrykti lærarar, foreldur og politikarar úr eini hugnaligari fatan um, at alt gongur so sára væl í tryggu Føroyum. Tí tað ger tað ikki. Tann hugnaligi fólkaskúlin, ið kendist so tryggur fyri mong, tí tey høvdu sama flokslærara í 10 ár, ið ikki kravdi stórvegis av næmingunum, fekk brádliga av grovfilini fyri at vera slappur og syrgiliga afturúrsigldur í heimsins stóra meldri. So rívandi galið mundi tað ikki vera kortini, tí kanningin vísti eisini, at summir skúlar vóru betri enn aðrir, og summi børn stóðu seg væl. Men at fólkaskúlin framvegis hevur eina stóra avbjóðing, vísti eisini næsta PISA-kanningin frá 2009.

Í teirri kanningini var ein ávís framgongd at hóma, serliga í lesing, men stór var hon ikki. Framvegis lógu Føroyar í niðasta triðinginum av londum, sum vit samanbóru okkum við, og vit lógu trygt á aftasta plássi í Norðurlondum. Í lesing var Finnlandi nr. 1, Noreg nr. 2, Ísland nr. 3, Svøríki nr. 4 og Danmark nr. 5. Aftast vóru so Føroyar. Í støddfrøði var Finnland nr. 1, Ísland nr. 2 og Danmark nr. 3. Síðan komu Noreg, Svøríki og Føroyar. Í náttúruvísindum var Finnland á 1. plássi, Noreg á 2. plássi, Danmark á 3. plássi, Ísland á 4. plássi, Svøríki á 5. plássi og so Føroyar á 6. plássi. Føroyar vóru ikki bara aftan fyri hini Norðurlondini, men langt aftanfyri.

## Eitt stig lægri

Hetta er tann beiski veruleikin, sum lærarar, foreldur og politikarar framvegis skulu taka støðu til, og í kanningini frá 2009 varð so eisini staðfest, at úrslitini í føroysku skúlunum vóru sera lík. Tey vóru javnt góð ella vánalig, sum tikið verður til í kanningini. Eisini varð staðfest, at føroyskir næmingar sum heild liggja eitt førleikastig lægri enn næmingar í hinum Norðurlondunum, tó at Finnland er í einum flokki fyri seg. Meira enn triði hvør næmingur í 9. flokki verður ikki roknaður at hava virkisføran lesiførleika, sum krevst til víðari útbúgving og at kunna røkja mong vanlig størv. Og vantandi undirvísingartilfar og órógv eru ein forðing fyri innlæring í skúlunum.

Hava lærararnir skyldina? Hava foreldrini skyldina, tí tey ikki stimulera síni børn? Hava leiðslurnar skyldina, tí tær krevja ov lítið av sínum lærarum? Hevur læraraskúlin skyldina, tí hann klekir ov vánaligar lærarar? Ella hevur bygnaðurin við smáum skúlaeindum, ið ikki skapa nakað munagott fakligt umhvørvi, kanska skyldina? Mong eru boðini, og herfyri frættist so, at trý fólk, ið hava verið frammi í almenna kjakinum, Rigmor Dam, lærari og kunningarráðgevi, Páll Isholm, deildarstjóri á Handilsskúlanum á Kambsdali, og Helgi Rasmussen, sálarfrøðingur, høvdu sett sær fyri at skipa fyri reflektiónsseminari um fólkaskúlan á Føroya Fólkaskúla.

Reflektiónsseminarið verður hósdagin 10. mars, og endamálið við tí er rætt og slætt at varpa ljós á innihaldið í skúlanum. Rigmor Dam vísir á, at allastaðni kring okkum verður skúlin lagdur undir luppin, tí fólk spyrja, um hann fylgir við tíðini. Tann gamli skúlin var lagaður til gamla ídnaðarsamfelagið. Hongur tann føroyski skúlin kanska fastur í ídnaðarsamfelagnum og hóskar ikki til vitanarsamfelagið, ið langt síðan hevur tikið dik á seg, spyr Rigmor Dam. Seminarið á Føroya Fólkaháskúla varð upprunaliga lýst at vera føstulávintsmánadag 7. mars. Men nógv skúlafólk eru upptikin tá, og tí varð tað flutt til 10. mars. Rigmor vónar tí, at nógv fara at møta upp at siga sína hugsan um skúlan.

– Bulurin í fólkaskúlanum er bygdur á tankar, sum spruttu úr nationalu vekingarrørsluni í 1800-talinum, við skúlaflokkum, tímatalvum, klokku, fimleikahallarroyndum, karakterum og lærarum, sum standa á odda fyri einum hópi av børnum í sama aldri og úr sama grannalagi. Men í dag kunnu næmingarnir fara á netið eftir øllum upplýsingum. Teir kunnu fáa íblástur og beinleiðis kopiera. Hetta setir krøv til undirvísingina og alla skúlaskipanina og eisini til lærarar og næmingar at brúka amboðini við skili. Tilfarið á netinum er ofta óskipað og tilvildarligt, so hugtøk sum keldukritikkur, margmiðlanýtsla og kunningarførleiki mugu uppraðfestast í framtíðini, vísir Rigmor Dam á.

## Upp úr skotgravunum

Páll Isholm vónar, at nakað munagott spyrst burtur úr átakinum á Føroya Fólkaskúla. Hann leggur dent á, at kjakið um fólkaskúlan má fáast upp úr skotgravunum millum Lærarafelagið og Mentamálaráðið og so politikararnar um smáar og stórar skúlar. Eisini heldur hann, at PISA-kanningarnar hava fylt ov nógv í kjakinum um skúlan, tí orsakað av teimum hevur næstan onki verður tosað um, hvønn skúla